gult18 cyan18 magenta18 svart18



B36-HB

# B36 hevur fótin í finaluni

**B36 sýndi til tíðir stórspæl, tá tær tryggjaðu sær stóran fyrimun í hálvfinaluni í steypakappingini. Hinvegin varð ringa vikuskiftið hjá HB undirstrikað - svart upp á hvítt**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tað mundi vera ein væl nøgdur kassameistari hjá FSF, sum sunnudagin kundi staðfesta, at heilt fitt av fólki var til fyrru hálvfinalurna í kappingini um Løgmanssteypið. Grannauppgerð var í høvuðsstaðnum, og umframt tann spenning, sum hetta altíð inniber, so var spenningurin kanska eyka stórur hesaferð. Í báðum feløgunum ganga áskoðararnir nevnliga við eini stórari vón um, at árið í ár er teirra, eins og báðir partar eru greiðir um, at júst grannarnir verða millum harðastu kappingarneytirnir hetta kappingarárið.

Gaman í høvdu liðni eisini hitst í bólkaspælinum í steypakappingini, men tá stóð ikki eins nógv upp á spæl, og venjararnir royndu kanska eisini at brýna liðini til undan landskappingini. Hesa ferð var ikki ráð til slíkar royndir. Finalusessurin í steypakappiningi var upp á spæl, og einki er at ivast í, at hesin er ein av aðalmálunum hjá báðum feløgunum.

## Gávuhýrur

Tá teir báðir grannarnir í høvyuðsstaðnum hava hitst, hevur tað aloftast verið soleiðis, at HB hevur verið omaná, og eina løtu var eisini líkt til, at hetta skuldi henda sunnudagin. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, vóru tað nevnliga teir reyðu, sum fingu hol á, tá komið var til miðjan hálvleikin. B36 framdi eina deyðssynd, tá eingin leikari var klárur at samla upp, eftir at Tróndur hevði boksað útfrá, og so kundi Hallur Danielsen draga eina ferð, áðrenn hann langaði bóltin í meskarnar.

B36 leikararnir vóru tó ikki teir einastu, sum syndaðu hendan dagin. Stutt eftir at HB hevði lagt seg á odda, framdi HB verjan tvey stór mistøk, sum viðførdu, at B36 brádliga hevði leiðsluna. Útjavningin kom, eftir at John Petersen sera óneyðugt fekk tillutað fríspark beint uttan fyri brotsteigin. Frísparikið varð rullað stutt til Jákup á Borg, sum við einum knallhørðum ristskoti sendi hann flatt í meskarnar.

Við seinna málið snorksvav HB verjan, tá Heðin av Lakjuni sendi ein bólt innfyri úr vinstru. Við handaru stong stóð Jákup á Borg einsamallur, og í veruleikanum hevði hann ikki annað val, enn at skalla bóltin út frá. Hetta tóktist HB verjan als ikki at sansa, men tað gjørdi Jan Guttesen hinvegin. Við fullari ferð slapp hann sær framat bóltinum, og við uttan stórvegis hóvasták smekkaði hann til, flatt yvir síðunetið.

Sostatt hevði B36 at kalla vent dystinum, áðrenn farið varð til hálvleiks, og stutt inn í seinna hálvleik fekk árstalsfelagið so aftur eina gávu frá grannunum. John Petersen hevði aftur fingið tiltuskað sær fríspark uttan fyri HB brtotsteigin, og HB leikararnir mundu allir vænta, at Jákup á Borg fór at skjóta. Í øllum førum tóktist eingin at hava hug at ansa Pól Thorsteinsson, so hesin hevði gott pláss at senda bóltin í meskarnar, tá frísparkið varð rullað til hansara.

Í roynd og veru avgjørdi hetta dystin, men HB hevði tó ein møguleika at koma aftur í aftur. B36 leikararnir vóru í øðini, um at Niklas á Líðarenda dømdi brotsspark, fyri at John Petersen hevði armin á bóltinum. Rúni Nolsøe staðfesti tó ringa HB-dagin, tá hann úr ellivu metrum sendi bóltin himmalhøgt upp um málið, og nærri enn hesum kom HB so ongantíð aftur í dystinum.



*Herbert í Lon Jacobsen tykist av álvara at hava bitið seg fastan á B36 liðið. Her hevur fingið gott tak á Una Arge, sum noyddist málleysur av vøllinum sunudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fleiri veikleikar

Sum nevnt omanfyri, so var dysturin eisini eitt slag av styrkisroynd hjá tveimum av FM-biðlunum, og um hendan er eftirfarandi, er einki at ivast í, at B36 í løtuni er væl sterkari enn HB. Sæð yvir ein kamb, arbeiddu leikararnir á B36-liðnum nógv betri, enn teir reyðu og svørtu. Teir fingu fatur á meginpartin av leysu bóltunum, og í fleiri førum stóðst vandi av, tá bólturin síðani varð sendir út í borðini.

Harafturat er tað í løtuni líkt til, at B36 hevur eina verju, sum er nógv tryggari enn tann hjá HB. Snøgt sagt, so nyttar tað lítið hjá HB, at hava eitt hitt vandamiklasta álopið í landinum, tá verjan samstundis gevur slíkar gávur, sum teir góvu sunnudagin. At leikarar í einari tankaleysari løtu tveita alt fyri borð, er ein barnasjúka, sum eitt lið als ikki hevur ráð at hava, um so er at ætlanir eru um ein leiklut í oddinum.

Har afturat tykist tað vera ein sera stórur trupulleiki, at liðið í ov stóran mun er tengt at, hvussu ein ella tveir leikarar standa seg. Serliga er Rúni Nolsøe sera týdningarmikil fyri spæl teirra, og í báðum dystunum um vikuskiftið var sjónligt, at spælið als ikki koyrir, um Rúnio verður tikin burtur úr dystinum. Eisini kom tað illa við hjá HB, at Pópl Thorsteinsson røkti verjuskyldurnar vinstru megin, soleiðis at rásarúmið hjá Allani Mørkøre gjørdist nógv minni, enn hann er vanur við.

Alt hetta eru lutir, sum arbeiðast má við, um HB ætlar sær at verða partur av oddastríðnum, og í so máta er tað so heldur ikki nøkur styrk, at liðið nú innan tveir dagar hevur sagt farvæl við bæði Jóhannis Joensen og Andrew av Fløtum, sum báðir nú mugu bíða í nakrar vikur, áðrenn teir aftur sleppa at royna seg.



*Tað er ein stórur trupulleiki hjá HB, at liðið er so nógv tengt at, hvussu fáir einstaklingar á liðnum – eitt nú Allan Mørkøre – standa seg*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Sterkt B36-lið

Er hýrurin í HB í botni í hesum døgum, man hann hinvegin vera heilt í toppi í B36. Leitast skal langt aftur, fyri at finna ein sigur hjá B36 móti HB, sum árstalsfelagið veruliga hevur kunnað nýtt til nakað. Bæði í 1996 og '98 var talan um týdningarleysat dystir, sum B36 vann á grannunum, og sæð burtur frá hesum báðum ferðunum, skal leitast aftur til steypafinaluna í 1991 fyri at finna ein týðandi B36-sigur á HB.

Sum nevnt omanfyri, so varð sigurin grundaður á tríggjar gávur frá HB-verjuni, men tað skerst ikki burtur, at B36 hevði sigurin uppibornan. Sum lið arbeiddu leikararnir nógv meira, og harumframt tykist tað nú eisini soleiðis, at mongu stjørnunøvnini á liðnum eru um at finna saman. Heldur ikki tykist liðið vera eins nógv bundið av einstøkum leikarum, sum HB-liðið er tað. John Petersen hevði ikki ein av sínum bestu døgum sunnudagin, eins og Jens Kristian Hansen varð skiftur út við skaða, men kortini megnaði liðið at halda fast um dystin, og hetta sigur helst ikki so lítið í so máta.

Um B36 liðið so er nóg sterkt til at tryggja finaluplássið, er eitt annað mál. Í øllum førum hava teir vunnið sær ein avgerandi fyrimun, men HB hevur áður megnað at vent slíkum dystum. Eisini tá tað veruliga hevur sæð svart út.

### B36-HB 3-1 (2-1)

0-1: Hallur Danielsen
1-1: Jákup á Borg
2-1: Jan Guttesen
3-1: Pól Thorsteinsson

**B36:** Tróndur Vatnahamar – Jens Kristian Hansen, Arnbjørn Danielsen, Herbert í Lon Jacobsen – Bjarni Prior, Klæmint Matras, Jan Guttesen, Heðin á Lakjuni, Pól Thorsteinsson – Jákup á Borg, John Petersen
**HB:** Bárður Johannesen – Vagnur M. Mortensen, Jón Rói Jacobsen, Hans á Lag, Janus M. Joensen – Allan Mørkøre, Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen – Uni Arge, Andrew av Fløtum

gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Bygdatalvið um ólavsøkupláss hongur

**Stríðið ímillum NSÍ og KÍ um, hvørt av hesum feløgunum skal spæla á Tórsvølli ólavsøkudag, er púra opið, eftir at stórt drama í Klaksvík endaði remis**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Hóast talan bara var um fyrru hálvfinaluna, og tað harvið kundi hugsast, at høvuðssetningurin bæði hjá KÍ og NSÍ fór at verða taktiskt at telva seg í eina góða støðu undan Kristi himmalferðardegi, so var tað rættuliga dramatiskt, tá KÍ og NSÍ brustu saman í Klaksvík.

Málmøguleikarnir vóru nógvir, liðini fingu eitt mál í part, tveir spælarar hjá NSÍ vórðu vístir av vøllinum, og annað vikuskiftið upp í slag misnýtti Harley Bertholdsen brotsspark fyri heimaliðið.

## Gylta NSÍ umfarið

Mótsatt landskappingardystinum ímóti B68, so var hugburðurin hjá NSÍ sera konstruktivur. Sum í landskappingardystunum og steypadystunum ímóti KÍ í fjør, so var útgangsstøðan hjá NSÍ at spæla fótbólt við denti á at spæla. Christian Høgni Jacobsen, sum Andrass Jacobsen mesta partin av tíðini hevði í stuttum tjóðri, var einsamallur á toppinum. Ian Højgaard var sera framrættaður miðvallari, og aftanfyri hann vóru í 1. hálvleiki Dánial Hansen og Brynjolvur Nielsen góðir.

Nett sum í fjør, so vóru tað síðuspælararnir, ið vóru vápnið, ið skuldi gera av við klaksvíkingar. Gert Langgaard í høgru og Jónstein Petersen í vinstru vóru skjótir, teir vóru ofta spældir í røttu løtuni, og teir vóru sera vandamiklir.

Í fyrra umfarinum hevði NSÍ yvirtakið nógv størsta partin av tíðini, og tað hevði einki forgjørt verið í tí, um teir høvdu verið frammanfyri við meiri enn tí eina málinum, sum teir fingu, tá átjan minuttir vóru farnir.

Eftir trý tøtt horna kom málið. Við nærra stólpan stútaði Christian Høgni Jacobsen umvegis høvdið á einum klaksvíkingi og í kassan.

## KÍ svaraði aftur

At heimaliðið hevði var so nógv undir trýsti hevði við sær, at Tomislav Sivic eftir steðgin valdi at skifta frá 4–3–3 og til 3–4–3. Hann tók seg sjálvan av vøllinum og setti Ova Nysted í álopið. NSÍ misti takið, tá síðuspælararnir ikki høvdu meiri orku at renna longu teinarnar, og tað hevði við sær, at Christian Høgni gjørdist rættuliga einsamallur.

Trýstið á NSÍ verjuna bara vaks, og tað var ikki annað, enn tað kundi roknast við, tá Hjalgrím Elttør, sum var sera væl upplagdur í KÍ álopinum, úr stuttari fjarstøðu eftir trunkaspæl bankaði bóltin upp í nettakið aftanfyri Jens Martin Knudsen. Í sambandi við málið noyddist Ove Nysted at taka seg aftur við knæskaða, og so varð Eyðun Klakstein settur í álopsplássið í høgru.



*Tað var í nógum førum sera tætt inni undir teimum báðum málunum, tá KÍ og NSÍ stríddust fyrra stríðið í hálvfinaluni*
*Mynd: SjH*

KÍ hevði fleiri aðrar møguleikar, men teir fingu einki mál. Hin størsta fingu teir við brotssparki. Sjúrður Jacobsen vardi við arminum á málstrikuni og varð vístur av vøllinum. Harley Bertholdsen, sum misnýtti ímóti HB, tók aftur ábyrgdina á seg, men hesa ferð sendi hann í tvørtræið og upp um málið.

At klaksvíkingar vóru fleiri á vøllinum hevði við sær, at teir kundu leggja eyka trýst á. Jens Martin Knudsen var í essinum og hevði rættuligt tak á brotsteiginum. KÍ fekk uppaftur betri treytir, tá eisini Ian Højgaard varð rikin av vøllinum, men klaksvíkingar megnaðu ikki at syrgja fyri betri útgangsstøðu Kristi himmalferðardag enn 1–1.

NSÍ legan var ikki væl nøgd við reyða kortið hjá Iani Højgaard, sum tók beinini undan Allani Joensen, tá hesin við nógvari ferð var farin frá mótstøðumanninum. At Ian Højgaard mundi kenna seg harman var einki at undrast á, tí hann hevði fleiri ferðir verið fyri ógvusligum samanbrestum í nærdystum, og ta einu ferðina lá hann eina fitta løtu.

Men NSÍ reið stormin av við níggju monnum, og um einki mál kemur í dystinum í Runavík, so verður tað NSÍ, sum sleppur at spæla á Tórsvølli ólavsøkudag.

### KÍ-NSÍ 1-1 (0-1)

0-1: Christian Høgni Jacobsen
1-1: Hjalgrím Elttør
**KÍ:** Meinhard Joensen – Andrass Jacobsen, Jan Andreasen, Allan Joensen– Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Fríðin Ziskason, Tomislav Sivic, Niclas Niclasen – Alexander Djordjevic, Hjalgrím Elttør
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Rúni Rasmussen, Arnfinn Langgaard, Djóni N. Joensen, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Dánial Hansen, Ian Højgaard, Brynjolvur Nielsen, Jónstein Petersen – Christian Høgni Jacobsen

# LÍF hevur enn ikki tapt

**Leirvíkingar hava enn ikki tapt í landskappingini hetta árið, og leygardagin vunnu teir týdningarmkla heimadystin móti NSÍ**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Leirvíkingar vórðu ikki undan kappingarbyrjan roknaðir ímillum favorittarnar í næstbestu deildini. Men tað hevur hilnast væl hjá Harry Benjaminsen og hansara monnum.

Leygardagin høvdu teir vitjan av teimum næstbestu hjá NSÍ. Talan var um eina tætta uppgerð, har nógv stríð var um miðvøllin. Ungu NSÍ menninir løgdu sera bragdliga fyri og trýstu nógv fyrsta korterið. Men LÍF hevur eina góða verju, og tvær ferðir bjargaði Allan Joensen í LÍF málinum meistarliga væl. Onnur royndin kom frá Bergi Djurhuus, og hina átti Ken Nónklett.

Leirvíkingar vóru ikki so lítið skerdir. Teir báðir fremstu álopsmenninir, Jonhard Høgnesen og Kristian í Vági, vóru ikki við, og tað hevði við sær, at tað var neyðugt at brúka spælarar í fremstu røð, sum ikki eru vanir at vera so frammarlaga.

Í fjør var pólverjin Mirek Gil góður á LÍF miðvøllinum. Hann hevur ikki verið við í teimum báðum fyrstu umførunum. Mikudagin kom hann aftur til Leirvíkar, og tá tað restaði ein hálvur tími ímóti NSÍ, varð hann settur inn. Tað hevði við sær, at spælið bleiv meiri skipað, og tá tað restaði eitt korter fekk LÍF mál. Magnus Skoralíð var meistari fyri tí, tá hann úr støðu eitt sindur til høgru dygst uttanvert brotsteigin sendi framvið manngarðinum hjá NSÍ og í málhornið aftanfyri Jákup Martin Hansen, sum annars royndist væl í NSÍ málinum.

Magnus Skoralíð hevði frammanundan havt ein góðan stútara dygst framvið málinum, og bæði Hanus Lervig og Fróði Joensen høvdu eisini góðar møguleikar.

Komandi vikurnar vera spennandi hjá LÍF. Leygardagin skulu teir í Gundadal at spæla ímóti HB, og so eru tveir heimadystir á skránni. Fyrst fáa teir vitjan av Skála, sum hevur fingið eina kanón byrjan í ár, og síðani koma niðurflytararnir úr Sumba til Leirvíkar. Teir hava fleiri ferðir syrgt fyri, at LÍF og Harry Benjaminsen ikki hava rokkið bestu deildini. Men nú tykjast vánirnar vera góðar fyri, at tað fer at eydnast leirvíkingum at enda omaná.

### LÍF-NSÍ 1-0 (0-0)

1-0: Magnus Skoralíð